

Starvsfólkalýsing

# Skipaeftirlitsfólk

**Skipaeftirlitið søkir eftir einum skipaeftirlitsfólki at seta skjótast gjørligt.**

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**

- í samstarvi við løgfrøðingin á Skipaeftirlitinum at umsita og dagføra tekniska partin av lógarverkinum innan sjóvinnuøkið við støði í altjóða sáttmálum
- málsviðgerð innan nautiska- og skipsbyggitekniska eftirlitsøkinum við serligum atliti til fiskiskip og ferðamannaskip.
- at hava umsjón við teimum løggildaðu klassafeløgunum o.ø. feløgum ella persónum, sum eru góðkendir til at gera tekniskar kanningar v.m.
- at hava eftirlit við skipaútgerð
- at hava eftirlit við arbeiðsumhvørvinum umborð á skipum, undir hesum samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:

- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur sum er serkønur innan sjóvinnu
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri, STCW III/2
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Dentur verður lagdur á, um umsøkjarin hevur viðkomandi starvsroyndir.

Harumframt er kunnleiki til góðskustýring (kvalitetsstýring) ein fyrimunur.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 18. februar 2005, kl. 14.30.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Skipaeftirlitið
Postmoga 26
370 Miðvágur

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355 600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

SKIPAEFTIRLITIÐ

Skipaeftirlitið, Miðvágur, Postrúm 26, 370 Miðvágur, Tel 355 600, Faks 355 601, fma@fma.fo, www.fma.fo


# DYGDARHÚS
## fyri kappingarførar prísir



Húsini, sum verða gjørd úr timburelementum til føroyska veðurlagið, hava nógvar dygdir:

- Styrkin í húsinum. Høvuðskonstruktiónin er 2x8" stólpar, fyri hvørjar 400 mm.
- Brunatrygg hús. Klæðingin á loftum, útveggum og skilaveggum er gjørd úr brunatryggum tilfari.
- Lágorkuhús. Húsini eru bjálvaði við 200 mm bjálving, og verða flokkað sum lágorkuhús.
- Skilaveggir eru bygdir soleiðis, at teir saman við yvirfalsaðum innhurðum við gummitetningi gera, at skilaveggir eru sera ljóðdoyvandi (48 dB)

Hesar og eisini aðrar dygdir fyri kappingarførar prísir. Og so er byggitíðin fyri lyklaklár hús bert 4 mánaðir.

Vit kunnu gera húsini lyklaklár, men eisini er møguligt at keypa húsini sum innilokaði hús við skilaveggum, fyri so sjálvur at gera tey liðug innan. Ella tit kunnu velja onkrar arbeiðstøkur burturúr.

**Húsini kunnu eisini verða bygd eftir tykkara egnu tekning!**

Ring og hoyr nærri ella vitja okkara heimasíðu
www.dygdarhus.com
tel 217646 ella 212662

TEAM85

Sosialurin
Sosialurin
i


TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Býlingshúsið inni á Gøtu**

Á stovninum eru tvær barnagarðsstovur við 21 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum. Fýra starvsfólk eru á hvørjari stovu.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið inni á Gøtu eftir:**
- einum pedagogi at byrja 1. mars 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Poulu Ejdesgaard, stovnsleiðara tlf. 317701.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum inni á Gøtu, Ovaragøta 30 B, FO-188 Hoyvík í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. februar 2005.